# 8 spurningar um jól

**Heini Lützen**




***Hvat er tað besta við jólum?***
- Vit vita ikki um okkara Frelsari varð føddur júst á jólum, men tað besta er at hann varð føddur. Familjuhugnin á jólum er eisini góður.

***Hvat er tað keðiligasta við jólum?***
- Kommersialiseringin!

***Hvussu helt tú jól sum barn?***
- Eg havi góð minnir um at vit plagdu vit at halda jól hjá ommu og abba í Havn. Nógv fólk og nógvar dunnur/gæs.

***Hvussu heldur tú jól í ár?***
- Eg vænti vit verða hjá mammu míni í ár. Vit plaga at ganga upp á skift.

***Hvat heldur tú um jólaresið í desember?***
- Eg haldi at fyri mær er tað ikki so nógv res. Vit royna at avmarkað jólagávurnar til at vera bara til børn. Einum nýtist ikki at taka allar jólahugnar og framførslur sum res - men heldur at velja at hugna sær.

***Hevur tú nakrantíð hildið jól uttanlands?***
- Ja, jólini 2001 hildu vit í New Zealandi, saman við vinum.

***Keypir tú sjálv/ur tínar jólagávur?***
Kona mín Óluva ornar flestu gávurnar; sjálv fær hon vónandi eina, sum eg sjálvur havi keypt.

***Hvat ynskir tú tær í jólagávu?***
- Kundi m.a. hugsa mær at vita hvat Ólavur fær burtur úr Kierkegaard - so, eina bók.

























